# Miðvikan



**Óli Jacobsen**
olijacobsen@post.olivant.fo

### John á Bakkanum:

# Bjargaði sínum skipsfeløgum, men misti lívið sjálvur

**Tað eru nógv bjargingarbrøgd gjørd av føroyingum og eisini av føroyskum fiskimonnum. Summi av hesum brøgdum er meira hoyrt um enn onnur. Lítið er hoyrt um bragdið hjá John á Bakkanum í Vestmanna við Queen Victoria í 1931, tá ið hann ofraði sítt egna lív við at bjarga sínum skipsfeløgum**

Finnleif Durhuus, ættaður av Sandi, greiddi frá hesum tilburði, tá ið hann herfyri var gestur á Torginum í Rás 2. Vit hava hildið hesa bjarging vera so einastandandi, at John eigur ikki at verða gloymdur. Finnleif hevur latið okkum hesa frásøgnina, sum hóskandi kann vera eitt framhald av frásøgnini um Ernestinu. Hesir báðir tilburðir hendu ár um ár, og teir líkjast eisini rættuliga nógv.

### Tá ið QueenVictoria strandaði í Meðallandsvíkini 17. mars 1931

*Finnleif greiðir frá:*

Henda frásøgn er skrivað eftir munnligari frásøgn frá pápanum, Ejvindi Winther Durhuus (1912-2001), sum 18 ára gamal var við “Queen Victoriu” á sínum fyrsta túri til skips. Hon fór á land í Meðallandsvíkini á Suðurlandinum tann 17. mars 1931 og gjørdist vrak. Hetta var fimm dagar aftaná, at teir vóru farnir av Vestmanna.

Jógvan Joensen Durhuus, nevndur Jógvan í Garðastovu, Vestmanna (1868-1930) keypti “Queen Victoriu” úr Onglandi 25. oktober 1900. Hon var bygd í Neuhof í Týsklandi í 1885 og merkt til 79,13 br. ton. Hon fekk ísettan ein 40 Hk. Tuxham motor veturin 1924/25. Jógvan í Garðastovu var elsti farbróður pápan. Hann førdi fleiri skip í yngri árum og fiskaði óføra væl.

Áðrenn pápin fór henda fyrsta túrin til skips, hevði hann fyri tað mesta arbeitt hjá John Olsen, reiðara og handilsmanni í Vestmanna.

Henda túrin við M/kt “Queen Victoriu” VN23 vóru 19 mans við. Skipari var Ábraham Jacobsen, Ábraham í Gørðum, Vestmanna. Hann hevði eisini ført “Queen Victoriu” árið fyri. Annars hevði hann ført “Doru” síðani 1924. Pápin og Ábraham kendust sera væl.

Tann 10. mars mynstraði Ábraham í Gørðum, eisini nevndur Ábraham hjá Ragnari, hesa manning við »Queen Victoriu«:

Michael Michelsen, 1. bestimaður, Mykinesi, Tummas Zachariassen, 2. bestimaður, úr Streymnesi, Jógvan Winther Durhuus, 1. motorpassari, Gunnar Haldansen, 2. motorpassari, Jógvan Johannesen, Jóhannes Jacobsen, John Johannesen, Kjartan Jacobsen og Ejvind Winther Durhuus, allir úr Vestmanna, Sofus Hansen, kokkur og Martin Eliasen, báðir av Slættanesi, Herlon Jacobsen úr Sandavági, Viggo Zachariassen úr Streymnesi, Petur Johannesen, Andrias Johannesen, Hjalmar Johannesen og Sámal Jacobsen, allir úr Miðvági, og Jóan Dávid Joensen úr Sørvági. Pápin og Jógvan W.Durhuus vóru brøður.

### Máttu upp í vantini heila nátt

*Pápin greiddi soleiðis frá:*

Vit fóru av Vestmanna Grækarismessudag í 1931 yvir á Suðurlandið. Ferðin yvir gekk væl, men eg var ringur av sjóverki. Komin í Meðallandsbuktina bleiv rættiligt ódnarveður av eystri við stormi og kavaroki. Vit løgdu bakk. Men uttan at vita av, at vit vóru komnir so nær landi, fingu vit tey fyrstu grunnbrotini út fyri Skaftarósa. Orsøkin til, at vit ikki vistu, hvar vit vóru staddir, var ólag á kumpassini (magnetiske forstyrrelser). Av tí, at ikki var hugsandi um at sleppa út frá landi aftur vegna so lítla motorkraft, varð avgjørt at halda “Queen Victoriu” undan, beint inneftir. Tað var helst okkara bjarging.



*Ejvind Winther Durhuus var fyrstu ferð til skips hendan vanlukkutúrin*

Bestimaðurin, Michael í Mykinesi, stóð til róðurs. Á veg inn ímóti landi var tað so óheppið, at vit rendu á eitt trolaravrak. Klokkan var tá um eitt á nátt 17. mars. Hol kom á skipið, ið fyltist eftir lítlari løtu. Allir mennirnir, ið vóru staddir niðri undir, máttu upp á dekki í tí, teir stóðu í. Teir, ið ikki sluppu inn í stýrihúsið, fóru fram í gron, meðan eg og tveir aðrir fóru upp í stórvantið at standa. Brotini løgdust yvir skipið, so at mennirnir máttu gøllhalda sær fyri ikki at verða skolaðir fyri borð. Náttarmyrkur var og tjúkt í kavaroki. Ongin av monnunum var í oljuklæðum. Teir flestu vóru illa íklætnir, hattleysir og vattleysir, onkur var skóleysur. Sjálvur var eg í buksum og einari tunnari troyggju, hattleysur og vattleysur. Soleiðis stóðu vit alla náttina í kava- og sjóroki. Hetta er ringasta nátt í mínum lívi. Í allari neyðini bóðu vit til Gud um, at Hann mátti bjarga okkum.

### Tummas helt um lítlabeiggjan

Tummas Zachariassen úr Streymnesi, ið var 2. bestimaður, hevði 15 ára gamla beiggja sín Viggo við. Hetta var eisini hansara fyrsti túrur. Tummas hevði nokk við at halda um beiggjan frammi í gron, tí hann var so bangin. Teir vórðu bjargaðir hesa ferð. Men so miskunnarleys var lagnan, at teir báðir fórust við “Lauru” í apríl í 1932, 13 mánaðar aftaná hesa hending, á veg heim av Suðurlandinum. Tá var Viggo 16 ár og Tummas 27 ára gamal. So syrgilig kann lagnan vera fyri nøkur av okkum.



*John à Bakkanum, hetjan í hesi søgu, við einum nósa í føvninginum*

Skiparin spurdi John á Bakkanum, sum var av bestu svimjarum, um hann helt seg til at svimja í land við einum enda. Tað meinti John, hann kundi, men hann helt onga nyttu vera í tí, soleiðis sum líkindini vóru. Hann bað skiparan bíða, til tað lýsti fyri degi.

Teir loystu so stóra bátin úr stólinum, fingu hann fram á bógvin og gjørdu hann kláran. Tá ið løgir vóru, settu teir bátin út. Hetta eydnaðist, og lupu seks mans niður í bátin við einari klænari línu. Men tað vildi so illani til, at eitt óløgi hvøldi bátin, áðrenn teir vóru leysir av skipinum. Sum eitt satt Guds undur komu allir á lívi umborð aftur. Teir bjargaðu sær upp á sprytið og svínaryggin. Bátin fingu teir inn aftur á dekkið.

### Fingu samband við land

Í lýsingini gjørdu teir aftur eina roynd at seta bátin út. Tá fóru í bátin John á Bakkanum, Kjartan Jacobsen og Herlon Jacobsen. Við sær høvdu teir eina klæna línu, sum var bundin í eina tjúkkari. John hevði bundið tann klæna endan um herðarnar, um hann skuldi verðið noyddur at svimja í land við endanum. Á veg inn gjøgnum brotini var John uttanborða og svam samstundis, sum hann styðjaði bátin. Komnir inn á sandin, drógu teir línuna inn á land til sín.

Framhald á síðu 16, 17 og 18